Krabbameinsfelagið:

# Mammografi tað besta vit kunnu bjóða



*Jansy Gaardlykke ivast í, hvussu álítandi kanningarnar eru, sum atfinningarnar móti mammografikanningum byggja á*

**– Vit hava ongantíð pástaðið, at mammografikanningar ongar vansar hava við sær, men tær eru framvegis tað besta, vit kunu bjóða. Vit eiga eisini at ansa eftir, at vit ikki bara gloypa eini kanning, sum hasi í Ugeskrift for læger, uttan at kunna okkum um aðrar kanningar, sigur Jansy Gaardlykke, samskipari á Føroya Felag móti Krabbameini**

MAMMOGRAFI-KANNINGAR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Atfinningarnar móti mammografikanningum, sum vórðu endurgivnar í blaðnum í gjár, koma ikki óvart á Jansy Gaardlykke, samskipara í Føroya Felag móti krabbameini.

– Slíkar greinar og atfinningar koma fram við jøvnum millumbilum. Sjálvt um tú kanst loyva tær at ivast í, hvat endamálið við teimum er, eiga atfinningarsomu røddirnar sjálvsagt eisini at verða hoyrdar. Men tað finst altíð ein onnur síða av málinum, og tí mugu vit bara viga fyri og ímóti, sigur Jansy, sum framvegis er sannførd um, at tað er rætt, at seta mammografikanningar í verk í Føroyum.

## Ongi dulsmál

– Sum er, hava vit onki betri enn mammografikanningar at bjóða í royndunum at forða fyri, at bróstkrabbi breiðir seg. Tí halda vit tað vera ábyrgdarleyst ikki at bjóða føroyskum kvinnum hesar kanningar, sigur Jansy, sum undrast yvir, at ført verður fram, at ongin kunning hevur verið í Føroyum um vansarnar við mammografikanningum.

– Eg havi sjálv fleiri ferðir sagt alment, at mammografikanningar kunnu ikki fyribyrgja bróstkrabba. At vandin fyri følskum positivum úrslitum er til staðar, og at kanningin ikki er pínuleys, hevur heldur ongantíð verið nakað dulsmál. Tað kann vera, at kunningin á ymsum heimasíðum ikki er so góð, sum hon átti at verið, men alt hetta fáa kvinnurnar at vita í einum brævi, tá tær verða innkallaðar, sigur Jansy. Hon vísir samstundis á, at ein heilt nýggj donsk kanning vísir, at kvinnur heldur vilja váða at fáa eitt falskt positivt svar, enn at lata vera við at fara til kanningina, og undrast yvir, at greinin í Ugeskrift for læger als ikki nevnir hesa kanningina.

At kunningin um mammografikanningar skal vera stýrd av peningaligum áhugamálum, dugir Jansy illa at ímynda sær. Um so skuldi verið, kunnu vit jú als ikki líta á nakra kunning um sjúkur og viðgerðir yvirhøvur, og so koma vit í øllum førum ikki langt í royndunum at fyribyrja og lekja, heldur Jansy.

## Finnast aðrar kanningar

Fyri Jansy sær tað út til, at greinin í Ugeskrift for læger mestsum leitar eftir onkrum at finnast at, tí øll, sum hava fylgt neyvt við í hesum kjakinum vita, at tað í flestu førum finnast kanningar, sum vísa nakað heilt annað, enn tað, sum greinin velur at taka við.

Til dømis heldur greinin uppá, at tað enn ongantíð er prógvað, at mammografikanningar hava verið við til at minka um talið á bróstkrabbatilburðum. Sambært Jansy er hetta beinleiðis skeivt. Kanningar hava fleiri ferðir víst, at í Svøríki, Noreg og Íslandi, har mammografikanningar verða gjørdar um alt landið, er talið á teimum, sum yvirliva bróstkrabba munandi hægri enn í Danmark, har bert trý amt bjóða hesar kanningar. Kanningar vísa enntá, at í økinum kring Keypmannahavn yvirliva 25% fleiri bróstkrabba enn í teimum amtum í Danmark, sum ikki hava hesar kanningar. Hetta samanberingargrundarlagið hevur vigað rættiliga tungt hjá Føroya Felag móti Krabbameini, tá heitt var á landsstýrismannin um at seta mammografikanningar í verk í Føroyum.

## Óneyðug diagnosa?

Jansy vísir á, at tað, sum hevur allarmest týdning í samband við viðgerðir fyri krabbamein, er at avdúka sjúkueyðkennini so tíðliga, sum til ber. Og sum er, eru mammografikanningar tað besta vit hava til at finna knyklar í bróstinum, sum tað ofta ikki ber til at finna uppá aðrar mátar.

– Tað kann sjálvandi henda, at óneyðugar diagnosur verða stillaðar, men spurningurin er, nær ella hvussu tú veist, um ein diagnosa er óneyðug. Tað óhugnaliga við krabbameini er jú, at tað er so trupult at meta um, hvussu sjálvt ein evarska lítil knykil fer at bera seg at seinni, og tí er neyðugt at handla uppá tað, man finnur, sigur Jansy.

J ansy Gaardlykke leggur afturat, at tað altíð hevur verið eitt aðalmál hjá felagnum at kunna so væl, sum til ber, um krabbamein og møguligar viðgerðarhættir. Tí vil hon í hesum sambandi eisini fegin minna á, at felagið 16. mars skipar fyri einum almennum fyrilestri, har íslendski læknin Baldur Sigfússon fer at geiða frá um mammografikanningar. Ísland var millum fyrstu Norðurlondini, sum settu í verk mammografikanningar, og Baldur Sigfússon er ein av teimum, sum hevur drúgvastu royndirnar á júst hesum økinum.

Tíverri eydnaðist tað ikki at fáa fatur í landsstýrismanninum í heilsumálum. Hann var farin í páskafrí